### Føðingar



Hey! Eg eiti Pætur Bogason Højgaard og varð borin í heim tann 20.10.08 á Hvidovre Hospital, Keypmannahavn. Eg vigaði 3710 gramm og var 53 cm. langur. Foreldur míni eru Ragnhild Ellingsgaard, Klaksvík, og Bogi Askildsen Højgaard, Tórshavn.

3. november fingu Fríðgerð og Árni Rasmussen, Hoyvík, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4625 gr.

4. november fingu Jona Lamain og Jákup í Horni, Hørsholm ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3665 gr.

8. november fingu Petur Weihe Dalsgaard og Stine Ulsø, Keypmannahavn ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4500 gr.

8. november fingu Gunvá Hovgaard og Heðin Magnussen, Argir, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3640 gr.

9. november fingu Rannvá Eysturberg Olsen og Rasmus Konggaard, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3400 gr.

9. november fingu Guðrið Jacobsen og Janus Berthelsen, Strendur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3325 gr.

9. november fingu Birita Baldvinsdóttir Eidesgaard og Jóannis Iversen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4000 gr.

9. november fekk Anny Leo Thorsen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

10. november fingu Una Weihe og Hallur Davidsen, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3300 gr.

10. november fingu Heidi M. og Svenn Harry Johansen, Saltangará, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4800 gr.

11. november fingu Juliet Trúgvadóttir og Magni Thomsen, Skála, eina dóttur. Hon var 57 cm. long og vigaði 3800 gr.

11. november fingu Bárða Brandsdóttir og Heini Tausen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4180 gr.

12. november fingu Sylvia og Peter Kofod, Leynar, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4200 gr.

**65 ár**
Mikudagin 12. november *fylti* Ronald S. Poulsen, 65 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini í Guttormsgøtu 8, leygardagin 15. november frá kl. 18.00. Øll eru vælkomin.

**70 ár**
Í dag, 14. november fyllir Masa Augustinussen, Vágur, 70 ár. Føðingardagurin verður hildin á Hotel Bakkanum leygardagin 15. november frá kl. 10.00-15.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 15. november kl. 13.00 giftast í Skála kirkju Paula S. Lervig av Skála og Óli Kristian á Torkilsheyggi av Nesi. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 7. november á tlf. 739093, 502050.

Fyri 40 árum síðan:

# Skipsførarar og stýrimenn í 1968



***Fremra rað f.v.:*** *Sigfríður Joensen, Gøtu, Jørleif Frederiksen, Múla, Mortan D. Holm, Porkeri, Poul Johannesen, Tórshavn, og Jógvan á Argjaboða, Argir.*
***Aftara rað f.v.:*** *Hans Godtfred M. Norðoy, Klaksvík, Sólbjørn Hansen, Klaksvík, Finnur Eyvindsson Dalsgaard, Tórshavn, Josef Henriksen, Sørvágur, og John Sune Johansen, Tórshavn*

Hesir skipsførarar og stýrimenn tóku prógv í Føroya Sjómansskúla fyri 40 árum síðan, á heysti 1968. Teir fingu prógvini handað tann 16. november 1968.

**Skipsførarar:** Sigfríður Joensen, Gøtu, Jørleif Frederiksen, Múla, Mortan D. Holm, Porkeri, Poul, Johannesen, Tórshavn, Jógvan á Argjaboða, Argir, og Hans Godtfred M. Norðoy, Klaksvík.

**Stýrimenn:** Sólbjørn Hansen, Klaksvík, Finnur Eyvindsson Dalsgaard, Tórshavn, Josef Henriksen, Sørvágur, og John Sune Johansen, Tórshavn.

**Dagurin**
**14. november. Fríðrikur.** Hildið verður, at her verður sipað til ein biskup í Utrecht, sum varð myrdur av leigudrápsmonnum í 838. Keisarinnan Judita hevði sent teir, av tí at Fríðrikur hevði roynt at fáa keisaran til at skiljast frá henni.

**15. november. Leopold**, deyður í 1136. Greivi í Eysturríki, sum varð skírdur halgimenni fyri mongu góðgerðir sínar og fyri tær kirkjur og kleystur hann læt byggja. Hann umkomst á eini veiðuferð. Navnið kemur av týska orðinum fyri fólk og djarvur.

**16. november. Otenius.** Skrivað skeivt fyri hin halga Otmarus, sum var abbati í kleystrinum St. Gallen í Sveis og doyði í 759.

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Petur Jespersen**, ættaður heiman av Sandi, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Lágargarði mikudagin, 82 ára gamal. Bønarhald verður á Lágargarði fríggjakvøldið kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin klokkan 13.00.

**Jens Reynhold Olsen av Toftum** andaðist týsdagin 11. november, 64 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin klokkan 16. Kistan kemur í Fríðrikskirkjuna umleið klokkal 18. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Jens Reynhold, kunnu lata Fríðrikskirkjuni eina gávu. Konta í peningastovnunum.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir